Álit

í

løgtingsmáli nr. 44/2020: Uppskot til løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli

Løgmaður hevur lagt málið fram tann 4. november 2020, og eftir 1. viðgerð tann 13. november 2020 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 18. og 25. november 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Dáturáðið, Michael Boolsen, fúta, og Bárð á Steig Nielsen, løgmann.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Christian Andreasen, Frimodt Rasmussen, Erhard Joensen, Steffan Klein Poulsen og Ingilín D. Strøm) tekur undir við málinum.

Meirilutin hevur ymiskar viðmerkingar.

Christian Andreasen, Frimodt Rasmussen, Erhard Joensen og Steffan Klein Poulsen viðmerkja, at uppskotið fer at gera rættarstøðuna í sambandi við yvirvøku við vakmyndatólum munandi greiðari enn sambært galdandi lóg. Undir nevndarviðgerðini hevur Dátueftirlitið boðað frá, at myndugleikin tekur undir við uppskotinum. Sambært uppskotinum skulu øll vakmyndatól skrásetast, og Dátueftirlitið hevur eftirlit við, at reglurnar verða hildnar. Myndir skulu strikast eftir 30 døgum, og tað er ikki loyvt at lata myndir til triðjamann uttan serligt loyvi.

Ingilín D. Strøm hevur hesar viðmerkingar:

Galdandi lóg á økinum um yvirvøku við vakmyndatólum er lov om forbud mod privates TV-overvågning m.v., ið varð sett í gildi í Føroyum í 1988. Tøkniliga og samfelagsliga er avgjørt nógv broytt hesi seinastu 30 árini. Tað er tí tiltrongt við eini dagførdari lóg á økinum.

Uppskotið avmarkar økini, har yvirvøka kann fara fram, setir krav um skelting ið upplýsir um yvirvøku á økjum, sum vanlig atgongd er til, avmarkar tíðina upptøkurnar verða goymdar, og setir greiðar reglur um vernd av dátum og persónupplýsingum.

Bæði lógin um yvirvøku við vakmyndatóli og dátuverndarlógin, sum báðar koma í gildi 1. januar 2021, regulera økið, og Dátueftirlitið hevur eftirlit við allari viðgerð av persónupplýsingum eftir Dátuverndarlógini umframt § 8 í lógini um yvirvøku við vakmyndatóli, sum snýr seg um víðarigeving og striking av upptøkum, sum eru gjørdar við tí endamáli at fyribyrja lógarbrotum. Farið verður frá skipanini, at Dátueftirlitið frammanundan skal geva loyvi at seta vakmynatól upp til eina skipan har tann, ið setir vakmyndatólið upp, skal boða Dátueftirlitinum frá. Dátueftirlitið skal skráseta øll vakmyndatól, sum verða sett upp.

Ásetingin um, at upptøkur gjørdar sambært § 8 skulu strikast eftir 30 døgum, er viðgjørd av fleiri hoyringarpørtum. Í hoyringarsvari, sum er viðlagt lógaruppskotinum, hevur Elektron víst á, at 30 daga freistin er ov stutt fyri almennar myndugleikar, tí tað ofta gongur longri tíð, áðrenn møguligt óreglusemi verður uppdagað. Harafturímóti hevur Dátueftirlitið víst á, at 30 dagar er long tíð at goyma upptøkur, og vísir m.a. til leiðreglur frá The European Data Protection Board (EDPB), ið gera greitt, at eitt ynski um at fyrbyrgja brotsverk ella herverk er vanliga grundin til eitt ynski um at seta upp vakmyndatól, og at brotsverk og herverk oftast verða avdúkað eftir ein ella tveir dagar. Jú longur upptøkan skal goymast, tess betri skal grundgevingin fyri at goyma upptøkuna vera. Fútin og løgmaður vístu undir nevndarviðgerðini á, at 30 daga freistin er úrslit av, at vigað er ímillum atlitið til tey, sum eru á upptøkunum, tann, sum fremur yvirvøkuna, og møguleikarnar hjá politinum at avdúka lógarbrot. Samsvarandi freist er galdandi í grannalondum, m.a. í Danmark.

Sambært lóggávuni um viðgerð av persónupplýsingum, dátuviðgerð og -vernd skal saklig orsøk vera til yvirvøkuna, og yvirvøkan, sum kann vera eitt inntriv í persónliga frælsið hjá tí einstaka, skal lúka lutfalsmeginregluna og ikki vera meira inntrívandi enn neyðugt fyri at røkka endamálinum við yvirvøkuni.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Sirið Stenberg og Hervør Pálsdóttir) tekur ikki undir við, at loyvismyndugleikin verður tikin frá Dátueftirlitinum, og at Dátueftirlitið frameftir skal virka sum eftirlit og ikki frammanundan góðkenna, at vakmyndatól verða sett upp. Millum annað av hesi orsøk tók minnilutin ikki undir við dátuverndarlógini, sum varð samtykt í seinastu tingsetu. Við hesum uppskotinum um yvirvøku við vakmyndatóli, skal Dátueftirlitið ikki longur geva loyvi at seta vakmyndatól upp, men tann, sum setir vakmyndatól upp, skal boða Dátueftirlitinum frá hesum. Dátueftirlitið hevur í sínum hoyringarskrivi víst á, at royndirnar vísa, at tað ofta er óheimilað, tá eitt vakmyndatól verður sett upp fyrstu ferð. Tá ið myndugleikin á økinum vísir á, at óheimilað uppsetan av vakmyndatólum javnan kemur fyri, hevði minnilutin ímyndað sær, at stig heldur vórðu tikin at byrgja fyri hesum.

Minnilutin metir málið sum álvarsmál, har loyvt verður at yvirvaka so at siga allar borgarar. Hóast yvirvøka við vakmyndatóli verður regulerað, so er spurningurin, hvussu eitt nøktandi eftirlit kann tryggjast. Sambært uppskotinum skulu dátuábyrgdarar á ymisku støðunum, har vakmyndatól verða sett upp, hava ábyrgdina av hesum, men hetta meta vit ikki vera nøktandi.

Eftir okkara tykki gongur hetta uppskot borgarum sera nær. Og tað er onki at ivast í, at tað skerjir persónliga frælsið. Øll ganga vit inn fyri at fyribyrgja kriminaliteti, men minnilutin er ikki sannførdur um, at hetta er einasti vegur at ganga. Yvirvøka við vakmyndatóli kann lættliga og ofta innihalda sera viðkvæmar persónupplýsingar, og tað sjónarmiðið vigar alt ov lítið í samlaðu metingini. Samanumtikið meta vit borgaran vera alt ov illa vardan, og atlitið til persónliga frælsið fyllir alt ov lítið í metingini.

Við at samtykkja hetta uppskotið økir Løgtingið um vandan fyri, at viðkvæmar persónupplýsingar kunnu koma óviðkomandi í hendi og eisini um vandan fyri skeivum brúki av vakmyndatólum. Her verður serliga hugsað um starvsfólk, sum í stóran mun kunna verða fyri yvirvøku, hóast upprunaliga endamálið kanska er at yvirvaka framleiðslu ella viðskiftafólk í handlum v.m.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 8. desember 2020

Christian Andreasen formaður	Ingilín Didriksen Strøm næstformaður	Frimodt Rasmussen
Erhard Joensen	Steffan Klein Poulsen	Sirið Stenberg
	Hervør Pálsdóttir	